## Nýggj bók um Pippi

Nú kunnu børn gleða seg til at sleppa at leggja lit á myndir av Pippi. Ein spildurnýggj litbók við upprunamyndum hjá Ingrid Vang Nyman er útkomin. Myndirnar eru úr kendum søgum um Pippi Langsokk eftir Astrid Lindgren. Í bókini eru sekstan myndir at lita, millum annað mynd av Pippi, meðan hon rullar deiggj á gólvinum, vaskar gólv við bustum á fótunum, ríður á tarvi, klintrar í trøum og ber hestin. Og so eru sjálvandi nógvar myndir at lita av Pippi saman við vinfólkunum Tummasi og Anniku. Bókin er heft og 32 blaðsíður.

*Kelda: bfl.fo*




## Onnur bók um eld komin

Onnur bókin í røðini um eldin er komin út. Tað er Eldsins gáta eftir svian Henning Mankell. Fyrra, Eldsins loyndarmál, kom út í vár. Bøkurnar eru grundaðar á veruligar hendingar hjá gentuni Sofíu, sum býr í Mosambik. Í fyrru bókini stríddist hon at koma fyri seg aftur, eftir at hava stigið á eina minu og mist yngru systur sína. Í hesari er onnur systir, Rósa, komin aftur úr Suðurafrika, og hon er álvarsliga sjúk. Sofía roynir at skilja, hvat er áfatt, men hon skilir ikki reiðiliga, bara hetta, at eldurin roynir at siga frá einari stórari vanlukku. Bókin er 206 blaðsíður og heft við klaffum.

*Kelda: bfl.fo*

# Illa tuskaðir aftur til Hvalbiar

**Ikki fyrrenn seinnapartin hósdagin kom sluppin Johanna aftur á Hvalba við monnum og seyði av Lítlu Dímun og hendan oyggjarferðin var av teimum strævnu**



*Bæði tvíføtt og ferføtt var illa tuskað eftir tveir strævnar rakstrardagar í Lítlu Dínum. Her leggja teir at bryggju í Hvalba eftir ein baldrutan túr upp á næstan tríggjar tímar um Suðuroyarfjørð*

RAKSTUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Teir 32 menninir, sum fóru í Lítlu Dímun at reka eftir slakti áðrenn tað lýsti fyri degi mikumorgunin, sluppu ikki heim aftur fyrrenn seinnapartin hósdagin, illa tuskaðir at eini skubbutari ferð.

Tað var sluppin Johanna, sum sigldi teir út og hon skuldi eisini føra bæði menn og seyð inn aftur av Oynni.

Líkindini vóru ivasom mikudagin og sum dagurin leið, vísti tað seg, at menninir sluppu ikki av aftur oynni, tí ókyrra var í sjónum. Fjallmenninir løgu tí veðurfastir á Lítlu Dímun hósnáttina.

Men umstøðurnar at vera í Oynni eru góðar og teir hava tvey hús at vera í og har eru bæði soviposar, teppi og gassplátur

Teir flettu eisini tvey lomb at hava til matna, so teir liðu onga neyð.

Tíðliga hósmorgunin fóru teir so undir at fáa seyðin av oynni, men eisini tá vóru líkindini heldur vánalig.

Jóhanna legði seg úti fyri klettin og tók ímóti seyðinum. At føra seyðin millum land og skip brúktu teir vanliga árabátar, men í hósmorgunin tók ein hvirla tann eina bátin, sum hólvdist og sakk. Hvørki fólk ella seyður var í bátinum, tá hann fór, men har var onki at gera uttan bara at hongja hann upp í Johonnu.

Men tað eydnaðist at fáa allar teir 212 seyðirnar umborð á Johonnu í øllum góðum.

Men menninir fingu ein baldrutan túr inn aftur. Nakrir mans fóru fyrst inn við einum minni útróðrarbáti, men restin kom inn við Johonnu.

Vanliga tekur ferðin ein slakan tíma, men hósdagin tók ferðin tveir og ein hálvan tíma.

Johanna gekk ikki meiri enn tvey míl tað mesta av vegnum, onkuntíð var hon heilt niðri á 1,4 mílum, tí tað var so óslætt.

Men klokkan knapt hálvgum trý hósdagin komu teir so tiltuskaðir aftur á Hvalba. Allir mans fóru beint til húsar at skifta og helst fáa sær ein bita, men longu hóskvøldið fóru teir aftur á bryggjuna at fáa seyðin upp og at býta hann. Tað vóru átta seyðir býttir upp á hvørja gyllin.

Sagt verður, at seyðurin er hampiliga væl fyri í ár.

Seinast teir løgu veðurfastir í Oynni var fyri 20 árum síðani, í 1988. Ta ferðina fóru teir í oynna fríggjadag, men sluppu ikki av henni aftur fyrrenn mánadag. Tá vóru ongi hús í Oynni, so teir máttu gista í hellinum, sum er í Oynni og sum hevur verið brúkt sum tilhaldsstað í mansaldrar.

Fleiri myndir av rakstrardegnum í Lítlu Dímun síggjast á www.portal.fo.

# Sterkt øl og brennivín til umrøðu í samgonguni

**- Tað er dupultmoralskt, at tað ikki er loyvt at bryggja sterkt øl og brennivín í Føroyum, heldur landsstýrismaðurin í vinnumálum**

RÚSDREKKALÓGIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Tað er mótstríðandi og dupultmoralskt, at vit ikki hava loyvi til at bryggja sterkt øl og brennivín í Føroyum, samstundis sum tað er loyvt at innflyta so nógv rúsdrekka, sum vit hava brúk fyri.

Tað heldur Johan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum.

Tí fer hann nú at taka spurningin upp í samgonguni um at geva loyvi til at bryggja sterkt í Føroyum.

Í Føroyum er ikki loyvt at bryggja øl og selja, sum er sterkari enn 5,8%, men tað er loyvt at innflyta rúsdrekka, sum í mesta lagi kann vera 60%.

Men nú hevur Tjóðveldi lagt uppskot fyri løgtingið um at tað eisini skal vera loyvt at bryggja sterkt øl og rúsdrekka í Føroyum og at tað eisini skal vera loyvt at selja tað sterkara ølið her á klettunum.

### Opið sinni

Hesum tekur landsstýrismaðurin í vinnumálum undir við.

- Hetta er ein spurningur, sum vit eiga at viðgera við opnum sinni við tí fyri eyga at geva loyvi til at bryggja sterkt øl og brennivín í Føroyum.

Hann heldur, at hetta hevði verið ein áhugaverdur møguleiki hjá okkara vinnulívi, serliga hjá okkara útflutningsvinnu og vit eiga at kanna allar møguleikar, sum kunnu stimbra okkara vinnulívi, serliga útflutningsvinnuni.

- Sum lógin er nú, forðar tað bryggjarívinnuni í Føroyum at menna seg, tí tað er ólógligt at bryggja sterkari øl enn 5,8%, samstundis sum innflutningurin er ótarnaður og tað er mótstríðandi.

Hinvegin staðfestir hann, at hetta er ikki eitt mál, sum er viðgjørt í samgonguni og tí kann hann bara svara fyri seg sjálvan.



*Johan Dahl fer nú at taka spurningin til viðgerar í samgonguni um at geva loyvi til at bryggja sterkt øl og brennivín í Føroyum*

Hann ásannar, at uttan iva eru ógvuliga ymisk sjónarmið í samgonguni um rúsdrekkalógina, so hann dugir ikki at siga, hvat úrslitið verður.

Men hann ætlar so at taka tað upp til viðgerar í samgonguni við tí fyri eyga at fáa undirtøku fyri, at tað skal vera loyvi at bryggja sterkt øl og brennivín í Føroyum.

Men hinvegin heldur hann eisini, at tað hevur týdning vit brúka neyðugu orkuna til fyribyrgjandi tiltøk, sigur Johan Dahl.